## DAGSINS MEINING

# Gott og ærligt tiltak

Leygardagin varð skipað fyri heldur óvanligum tiltaki í høvuðsstaðnum. Talan var um eina fagnaðargongu til frama fyri tolsemi, virðing og fjølbroytni.

Fyriskipararnir vóru fólk úr mentanarliga umhvørvinum í býnum. Hesi høvdu tikið seg saman at skipa fyri einum jaligum tiltaki, har høvuðsboðskapurin var at fagna heldur enn móttmæla. Vart varð gjørt við tað positiva og góða, sum eyðkennir okkum øll, og at vit, hvussu ymisk vit enn eru, skulu kunna liva saman og virða hvønn annan. Nettupp fjølbroytni ger eitt samfelag livandi og spennandi og mennandi.

Spírin til hetta sjáldsama men ríka og góða tiltak er sprottin burtur út teimum byltingum, sum verið hava í seinastuni eitt nú í sambandi við tey samkyndu. Heldur ógvusligu útsøgnirnar um eitt nú tann partin av føroyingum hava givið fólkum og felagsskapum í Havn hugskotið til at skipa fyri eini fagnaðargongu og tónleikatiltøkum í tí sambandi.

Gingið varð frá Sjónleikarhúsinum oman á Vaglið, har fyrrverandi løgtingskvinnan Karin Kjølbro helt eina livandi og virðiliga røðu, sum nettupp undirstrikaði týdningin av "herrópinum" fyri hetta tiltak: "Tolsemi, virðing og fjølbroytni". Tað var sum á ólavsøku tóku fleiri til orðanna. Henda stóra luttøka sýnir okkum, at til ber at savna fólk til jalig tiltøk av slíkum slag sjálvt á vetrartíð bara innihaldið og endamálið er gott. Av Vaglinum var farið oman í nýggju mentanargøtuna Tórsgøtu, har Miðlahús og Margarinfabrikk lótu dyrnar upp og borðreiddu við alskyns góðum tónleiki.

Eitt gott og ærligt tiltak, sum eisini kundi verið endurtikið, tá tað um aðrar samfelagsspurningar umræður, og har tú uttan átrúnaðarligan ella politiskan lit hevur brúk fyri at sameina og byggja brýr millum einstaklingar, bólkar, felagsskapir ol. heldur enn at seta kílar í og bróta niður. Rós til fyrireikararnar og tøkk til luttakararnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Útlit eru fyri búskaparvøkstri

**ALFRED OLSEN**
Løgtingsmaður



**Tann føroyski búskapurin hevur tað gott, vóru boðini hjá Búskaparráðnum eftir árslok, og víst varð á, at samgongan hevði sett tað røttu búskaparligu kósina, sum er at økja um inntøkurnar, gera íløgur og tálma rakstrarútreiðslunum.**

**Hvussu eru so útlitini fyri inntøkum í 2006?**
Ríkisveitingin verður á sama støði sum seinasta ár, og inntøkurnar í fiskivinnuni síggja út til at koma at vera á sama støði sum í 2005, meðan alivinnan og aðrar vinnur síggja út til at kvinka uppeftir.

Føroyar hava gjørt brúkiligar fiskivinnuavtalur við Norra, EU, Rusland, Ísland umframt eina fyri okkum nøktandi avtalu um svartkjaftin.

Harumframt koma vit at hava nakrar spennandi royndarboringar eftir olju í summar, sum kunnu koma at hava stóran týdning fyri framtíðar oljuvinnu við Føroyar.

Eisini arbeiðir samgongan við at vit fáa betri handilssáttmálar við Ísland, EU, Rusland og onnur lond, sum koma at betra um hjá virkjunum á landi, so út frá hesum, síggja tey fíggjarligu útlitini fyri 2006, ikki so døpur út, men vit vita øll, at trupult er at spáa um framtíðina.

**Nótaskipini**
Verður nógvur svartkjaftur at fáa og við teimum makrel- og sildakvotum avtalað er gjørd um, sær út til, at hesin skipabólkur kemur at klára seg, serliga um fiskaprísurin verður á sama støði sum í 2005 og um oljuprísurin lækkar, og tað tryggjar manningunum eina hampuliga góða ársinntøku.

**Flakatrolararnir**
Avtalurnar við Norra og Rusland skapa fortreytir fyri, at okkara flakatrolarar kunnu fiska tosk í Barentshavinum, umframt kongafisk í Irmingarhavinum og svartkalva í Eystursgrønlandi, sum alt annað líka kann vera eitt nøktandi fíggjarligt grundarlag undir rakstrinum av skipunum og inntøkuni hjá manningini.

**Rækjubátarnir**
Hesi seinastu árini hevur rækjuvinnan veri ein undirskotsvinna, sum hevur kostað eigarunum nógvar milliónir, og sum hevur viðført, at skip eru farin á tvang ella eru seld, við tí úrsliti, at vit bert hava 2 rækjuskip sum fiska rækjur í dag.

Eg vóni, at tað eina skipið sum liggur svínabundið í dag, kann koma í vinnu aftur, soleiðis at vit koma at hava 3 rækjuskip til fiskiskap í ár, tí kvoturnar í Eystursgrønlandi, á Grand Bank (L3 økið) og á Flemmich Cap, kunnu um væl veit við, vera tað neyðuga fíggjarliga grundarlagið fyri rasktrinum, nú rækjuprísurin kvinkar uppeftir og oljuprísurin fellur nakað.

**Skip sum royna við Føroyar**
Tað eru ávís tekin í sól og mána, sum benda á, at fiskiskapurin hjá djúpvatnstrolarum, garnabátum, línubátum, landleiðstrolbátum, útróðrarbátunum v.m., kemur at vera brúkiligur í ár og higartil sær út til, at fiskaprísurin kemur at halda sær, og tað talar fyri, at okkara burðardygga fiskivinna kemur at vera tað fíggjarliga grundarlagið fyri heimaflotan og manningarnar.

**Virkir á landi**
Flakavirkini á landi koma uttan iva at hava ein fíggjarligan tungan rakstur í ár, eins og í 2005, og her er uppskriftin til broyting, framburð og dynamik, privatisering umframt betri marknaðaratgongd.

Meðan virkir innan byggivinnuna, handilsvinnuna og líknandi, síggja út til at koma at hava nøktandi ordrar og sølu, bæði fyri virkið sjálvt og arbeiðsfólkið.

**Alivinnan**
Tað sær út til, at alivinnan er í menning og meira av smolti verður útsett og sjúka ger ikki so nógv um seg, so vónandi kemur uppsvingið í alingini at halda fram í ár, umframt at nýggjar royndir innan aling við kalva og toski vera gjørdar.

**Skapa búskaparvøkstur**
Ein fyritreyt fyri inntøkuvøkstri er, at vit síggja møguleikarnar sum eru í fiskivinnuni, oljuvinnuni, vinnuni á landi, gransking v.m. og at vit útnýtta allar møguleikarnar, og tað skulu vit gera, tí harvið skapa vit ein búskaparvøkstur úr teimum møguleikum sum vit fáa í ár.

**Útreiðslurnar**
Vit eiga at gera neyðugar íløgur innan undirstøðuverkið, heilsuverkið, skúlaverkið, gransking, v.m., samstundis sum vit tálma vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum, og harvið nærkast javnvág á fíggjarlógini í 2007.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.